SKYN

# Ikki bert ognir, men heim



## TÓRSHAVN
Íbúð, Berjabrekka 185

| | | | |
|---|---|---|---|
| 92 | 122 | 2 | 1989 |

Sera hugnalig og ljós íbúð í tveimum hæddum. Í ovaru hæddini er durur, baðirúm, køkur og stova. Í niðaru hæddini er gongd, vesi/vaskirúm og tvey kømur. Útgongd er til terassu í niðaru hæddini. Øll íbúðin er málað hvít innan, og hon er sera snøgg og hugnalig. Møguleiki er at byggja um leið 24 fermetrar uppí. Íbúðin er í friðarligum og barnavinaligum umhvørvi við góðum grannalagi. Parkeringsviðurskiftini eru góð, stutt er til handils, og býlingshús er nærindis. Busssambandið er gott.

Prísuppskot: kr. 1.600.000








SENDISTOVAN

## TÓRSHAVN
Íbúð, Marknagilsvegur 87



| | | | |
|---|---|---|---|
| 68 | 73 | 1 | 2003 |

Góð og ljós íbúð frá 2003. Íbúðin, sum er á fyrstu hædd, hevur gott útsýni. Í íbúðini er gongd, vaskirúm, baðirúm, stova og køkur í einum og tvey kømur. Eisini er skúrur, sum kann nýtast sum goymslurúm. Stutt til Handilsskúlan, Tekniska skúla, vøggustovu/barnagarð og handlar. Busssambandið er gott.

Prísuppskot: kr. 1.450.000




## OYRARBAKKI
Sethús, Oyrarbakkavegur 27



| | | | |
|---|---|---|---|
| 126 | 596 | 3 | 1938 |

Eldri sethús í trimum hæddum. Í miðhæddini er durur, gongd, køkur, tvær stovur og baðirúm. Á loftinum er trappugongd, trý kømur og vesi. Í niðastu hædd er kjallararúm. Hjallur og seyðahús hoyra til ognina. Húsini standa væl fyri í friðarligum, hugnaligum og barnavinaligum umhvørvi, og útsýnið er sera gott. Dagstovnur, skúli og handlar eru nær við. Gott busssamband.

Prísuppskot: kr. 650.000


